

## Kanna Bhutto-morðið

ST-aðalskrivarin, Ban Ki-moon, ætlar, at ST skal skipa fyri sínari egnu kanning av tilburðinum, tá fyrrverandi pakistanski forsætisráðharrin Benazir Bhutto bleiv myrd. Ban Ki-moon, sum hitti pakistanska forsetan í gjár, segði aftan á fundin, at morðið skakaði heimssamfelagið. Bhutto doyði í einari sjálvmorðsbumbuatsókn tann 27. desember í 2007, og myndugleikarnir í Pakistan vildu tá vera við, at bumbumaðurin hevði tilknýti til al-Qaeda.

## Snýtt fyri 8 mia.

Japanska løgreglan hevur handtikið ein stjóra í einari fyritøku í Tokyo, tí løgreglan hevur illgruna um, at hann hevur svikað fyri meiri enn átta milliardir krónur. Myndugleikarnir siga, at maðurin, sum eitur Kazutsugi Nami, lumpaði nógvar íleggjarar til at gera íløgur í hansara fyritøku, og at hann lovaði teimum 36 prosent í vinningi á hvørjum ári. Tann 75 ára gamli maðurin hevur sambært løgregluni í Tokyo snýtt umleið 37.000 íleggjarar.

# Skapt okkara egnu fíggjarkreppu

**- Skattalættarnir hjá undanfarnu ABC samgongu hava kostað landi og kommunum í minsta lagi 372 milliónir krónur um árið. At CHE fekk avtikið ætlaða skattalættan fyri 2009 hevur longu merkt, at minni lønarútgjald merkir størri skattainntøkur til landið, sigur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi**

SKATTAPOLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Tað er ein ábyrgdarleysur fíggjarpolitikkur sum hevur ført til, at vit nú eru endað í einari búskaparligari kreppu. Serliga skattalættin hjá undanfarnu ABC-samgongu hevur kostað dýrt, og hevði CHE-samgongan ikki fingið avtikið ætlaða skattalættan fyri 2009, hevði staðið enn verri til, sigur Høgni Hoydal.

Hann ger vart við seg í sambandi við útmeldingina hjá fíggjarmálaráðharranum um, at januar mánaði í ár royndist betur í skattainntøkum, enn sami mánaði í fjør. Hetta hóast lønarútgjaldið í ár var 595 milliónir í mun til 599 milliónir í januar mánaði í fjør.

- Hetta var ein skattalætti, sum skuldi setast í gildi í fýra stigum. Fyrsta árið kostaði hann landi og kommunum 100 milliónir, næsta árið 220 milliónir, triðja árið 320 milliónir, og nú kostar hann landi og kommunum í minsta lagi 372 milliónir krónur um árið, vísir Høgni Hoydal á.

Hann metir ikki, at eitt tal upp á 30 milliónir um árið í skattalætta er rætt og vil vera við, at veruliga talið er munandi hægri. Men hann metir eisini, at veruliga undirskotið á fíggjarlógini stavar ikki so nógv frá minkandi skattainntøkum, men frá raplandi avgjaldsinntøkum.

- Skattalættarnir hava bara ført til eitt, og tað er økt forbrúk. Og tað sigur seg sjálvt, at tá forbrúkið minkar, so minkar eisini inntøkan av mvg og øðrum avgjøldum, og tað førir so aftur til, at tað manglar í hjá landskassanum, sigur Høgni Hoydal.

### Pumpa forbrúkið upp

Formaður Tjóðveldis sigur, at ábyrgdarleysi búskaparpolitikkurin byrjaði longu, tá undanfarna ABC-samgonga tók við, og fíggjarpolitikkurin undir Bárði Nielsen legði lunnar undir eina forbrúkaraveitslu, har allur peningurin fór til innflutning, meðan útflutningurin var minkandi.

- Frá at hava havt javnvág á handils- og gjaldsjavnanum fóru vit til eitt risa undirskot, alt orsakað av ábyrgdarleyst førda búskaparpolitikkinum. Lagt var upp til eina ovurnýtslu í samfelagnum, og tá forbrúkið nú minkar, manglar landskassanum peningin, sigur Høgni Hoydal.

Formaður Tjóðveldis heldur, at stóra undirskotið á fíggjarlógini er ein beinleiðis avleiðing av ábyrgdarleysa búskaparpolitikkinum seinastu árini.

- Eg hugsi, at fólk flest ikki eru so fegin um at gjalda skatt, men eg ivist ikki í, at tey kortini fegin vildu goldið eitt vet meiri í skatti fyri at varðveitt tær tænastur, sum nú eru skornar burtur, sigur Høgni Hoydal.

Hann sigur, at tað er ein beinleiðis undanførsla, tá samgongan skyldar upp á altjóða fíggjarkreppuna og gevur henni skuldina fyri kreppu og undirskoti á føroysku fíggjarlógini.

- Altjóða kreppan hevur als ikki rakt Føroyar enn. Tann kreppa, sum vit eru í, er skapt av okkum sjálvum. Við førda búskaparpolitikkinum hava vit skrúvað forbrúkið upp, og tá tað so minkar, minka inntøkurnar hjá landskassanum, og tað hevur so aftur ført til, at vit hava heilar 500 milliónir krónur í undirskoti á fíggjarlógini í ár. Alt samalt orsakað av einum ábyrgdarleysum búskaparpolitikki undir undanfarnu ABC-samgongu, sigur Høgni Hoydal, sum kortini fegnast um, at CHE-samgongan megnaði at avtaka ætlaða skattalættan fyri 2009, nakað sum hann metir longu hevur havt sína positivu ávirkan á inntøkurnar hjá landskassanum.



*Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldis. Ábyrgdarleysi skattapolitikkurin kostar landi og kommunum í minsta lagi 372 milliónir krónur um árið*

# Kommunur minni skatt

**Fyribils skattauppgerðin fyri januar mánaða vísir, at landið fekk nakað meiri inn í skatti, meðan kommununnar partur minkaði**

SKATTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Munurin á skattainntøkunum hjá kommununum fyri januar mánaði í ár í mun til sama mánaða í fjør varierar úr einari meirinntøku upp á 28,17% til eina minni inntøku upp á 28,32%. Men tað er hjá teimum heilt smáu kommununum.

Fugloyar kommuna fekk í januar mánaði í ár 88.082,00 krónur inn í skatti móti 68.722,00 í januar í fjør, svarandi til 28,17%. Hinvegin fekk Húsa kommuna 75.139,00 krónur inn í januar í ár móti 104.831,00 krónum í januar í fjør, ein minking á 28,32%.

Hjá størru kommununum liggur munurin millum +11,43% og -14,82%. Størsta vøksturin hevur Eysturkommuna við 11,43% meiri í skatti, meðan Sørvágs kommuna fær heili 14,82% minni inn í januar í ár í mun til sama mánaða í fjør.

Bæði Tvøroyrar og Vágs kommuna fingu meiri inn í skatti í januar í ár í mun til sama mánaða í fjør, ávikavist 70.968,00 krónur meiri (1,99%) og 142.571,00 krónur (5,94%).

Annars er virksemið vesturi í Vágum nógv minkað, sambært skattatølunum. Sum nevnt fekk Sørvágs kommuna 14,82% minni inn í skatti í januar í ár í mun til í fjør, og sama er galdandi fyri Vága kommunu, sum fekk 12,70% minni inn í skatti.

Í Havn minkaði skattainntøkan úr 43.352.356,00 krónum niður í 42.506.103,00 krónur svarandi til 1,95%.

Samlað minkaði skattainntøkan hjá kommununum úr 98.468.759,00 krónum fyri januar 2008 niður í 96.958.016,00 krónur fyri januar í ár, ein minking á 1.510.743,00 krónur svarandi til -1,53%, vísa fyribils hagtøl frá TAKS.

MODUL I - 6., 7. og 8. mars 2009

ENNEAGRAM

- mennandi
spennandi
& stuttligt



**FØLIR TÚ VIÐHVØRT**, at tú ikki rættiliga skilir tínir starvsfelagar? Ella at teir ikki skilja teg? Bresta tit ov ofta saman ella tosa forbí hvønn-annan?

**VIT HAVA KANSKA LYNDI TIL** at halda, at flestu fólk eru sum vit sjálv. Av tí sama verður samskifti við onnur ikki altíð so gott, sum tað kundi verið.

**SKALT TÚ SAMSKIFTA VÆL** og fáa mest møguligt burturúr bæði vinnuligt og privat, hevur tað stóran týðing at kenna fyrst og fremst tína egnu, men eisini aðrar vangamyndir.

**ENNEAGRAMMIÐ HJÁLPR** okkum at skilja ymiskar persónstypur ella vangamyndir. Hetta hava kendar og vælriknar fyritøkur so sum Microsoft, Novo Nordisk og Pfizer í Danmark tikið til sín. Hesar brúka Enneagrammið í teirra innanhýsis samskifti.

**VIÐMERKINGAR FRÁ LUTTAKARUM**

"Tað var yvirraskandi beinrakið...Eg lærdi nógv um meg sjálva, bleiv beríka og fekk stórt innlit." Johild Thomsen

"Ennegrammið kann brúkast til næstan alt..." Regin Berg

"Góð innleiðing - Sera gott v/ livandi fyrimyndum!" Ingunn Danielsen

"Eg haldi at hetta er so beinleiðis brúkiligt og sera viðkomandi grundarlag undir sjálvsmenning og menning av samvirkandi felagsskapum..." Leiðari, Tórshavnar Kommuna

**KOSTNAÐUR**
Einans 3475,00 fyri alt vikuskiftið

**TILMELDING**
Tilmelding og les meira á www.synergi.fo.

Synergi - Tórshavn - 22RING (227464) - synergi@synergi.fo

Synergi